


## Byggja ferjur

Norska reiðaríið Fjord Line hevur nú bílagt tvær nýggjar ferjur, sum skulu sigla millum Bergen og Hirtshals. Ferjurnar, sum verða 170 metrar langar, skulu hava pláss fyri 1.500 ferðafólkum og umleið 600 bilum. Tann fyrra skal latast eigarunum í mars í 2012 og tann seinna í oktober sama ár. Skrokkarnir verða bygdir á Stocznia-skipasmiðjuni í Póllandi, og skipini verða gjørd liðug hjá Bergen Group Fosen. Kostnaðurin fyri tey bæði skipini er 206 milliónir evrur, sum svarar til umleið 1,6 milliard norskar krónur, skrivar Aftenposten.

## Arctic Viking roynir í Eysturgrønlandi

Rækjutrolarin Arctic Viking úr Kollafirði roynir í løtuni í Eysturgrønlandi. Teir hava um 40 tons inni. Arctic Viking hevur verið Eysturgrønladi í eina góða viku. Teir royndu í einar 3-4 dagar við flótitroli, men hetta gav onki, upplýsir Niklái Petersen, skipari. Hann sigur eisini, at tað hevur verið finasta veður, men fyrrakvøldið sjaskaði kortini eitt sindur.

# Tinglimir tveittir út í eitt eljustríð



*Hans Pauli Strøm og aðrir við honum, eru rættiliga fortørnaðir um, at tinglimir úr samgongu og andstøðu hava sett eld í tingarbeiðið ístaðin fyri at viðgera tey álvarsmál, sum eru í samfelagnum*

**Hans Pauli Strøm er rættiliga fortørnaður um uppskotini um at gera Føroyar aftur til fleiri valdømi. Hann kallar framferðina hjá formansskapinum í Løgtinginum fyri ábyrgdarleysa**

VALDØMINI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta fer at kasta alt Løgtingið út í eitt eljustríð alt hetta tingárið.

Hans Pauli Strøm, tingmaður fyri Javnaðarflokkin, er rættiliga fortørnaður um, at fýra uppskot nú eru løgd fyri Løgtingið um at broyta valskipanina.

Hann kallar tað bæði hugstoytt og harmiligt, at Løgtingið nú skal verða bundið av slíkum glæntrileiki.

Hann heldur, at hetta er serliga átaluvert, tá ið hugsað verður um, at tað eru bara tvey ár valskipanin varð broytt seinast.

– Ístaðin at viðgera valskipanina, eiga allar kreftir at verða brúktar upp á at fáa javnvág aftur í búskapin, sigur hann.

Tingið hevur nógv álvarsmál og teimum eru stórmál og bæði Løgting og tingnevndir fáa fullar hendir av álvarsmálum at viðgera, alt hetta tingárið.

Umfram búskaparligu støðuna, nevndi hann nýskipanirnar á kommunuøkinum, í fiskivinnuni, skúlaøkinum og á pensjónsøkinum.

– Men at viðgera hesi stórmál, skal øll tíðin og orkan ístaðin brúkast at fonglast við hesi málini um valskipanina, sum nú verða tveitt á bálið til stóran skaða fyri tey álvarsmál, sum liggja fyri framman.

Serliga átalaði hann eisini, at Jógvan á Lakjuni úr samgongini, var farin í part við Hergeir Nielsen úr andstøðuna um at seta eld í.

Og tað var ikki meiri enn ein mánaði síðani, at sami Jógvan á Lakjuni hevði sitið á samgongufundi og verið fremsti talsmaður fyri at sópa øll uppskot frá andstøðuni til viks, tí hesum kundi samgongan ikki finna seg í.

Edmund Joensen spurdi um tinglimir vórði blivnir spinnandi óður í høvdinum at pilkast við valskipanina ístaðin fyri at fáast við veruligu trupulleikarnar, har pengarnir fossa úr landskassanum.

Hann kallaði tey, sum vildi hava fleiri valdømi fyri lokalar kongar og barónar.

Og her skal viðmerkjast, at tingárið endar um ein góðan mánaða, tí í seinasta lagi flaggdagin er ætlanin, at tingið skal fara í summarfrí.

### Andstøðan samd

Bjørt Samuelsen úr Tjóðveldi helt, at hesin hurlivasin var eitt úrslit av, at vit høvdu ein skrúggjandi tørv á politiskari leiðslu og tað hevur onki við at gera um vit hava 1,7 ella 18 valdømi.

Karsten Hansen staðfesti, at vit sigla alvorligan vandasjógv.

– Og so skulu vit brúka orkuna á tingi og í nevndum til er at viðgera valskipanina í skundi.

– Tað, sum er átrokandi at viðgerða, er ikki talið á valdømum, tí vit eiga heldur at gera okkum greitt, hvat vit gera við trupulleikarnar í samfelagnum.

## Vil ikki vita av suðuroyingum

**Sterki javnaðarmaðurin á Sandoy vil ikki hoyra talan um at leggja Sandoy og Suðuroy saman í eitt valdømi**

VALDØMI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Sandoy og Suðuroy skulu ikki leggjast saman til eitt valdømi.

Tað er Gerhard Lognberg púra avgjørdur í.

Í gjár viðgjørdi Løgtingið ikki færri enn fýra uppskot um, hvussu nógv valdømi skulu vera í Føroyum.

Eitt av hesum uppskotunum eiga Hergeir Nielsen og Jógvan á Lakjuni úr formansskapinum í Løgtingum og endamálið við tí er at leggja Føroyar í fimm valdømi, har Sandoy og Suðuroy eru saman í einum valdømi.

– Ætlanin um at leggja Føroyar í fimm valdømi, har Sandoy og Suðuroy eru saman, er tað ringasta uppskotið av øllum.

– Tað er beinleiðis órættvíst at, tí tað tykist sum um, at endamálið við tí er at leggja veikasta øki í landinum undir eitt størri øki, sigur Gerhard Lognberg.

Honum hóvar heldur ikki uppskotið um at seta eina nevnd at viðgera valskipanina, tí tað skal vera Fróðskaparsetrið sum skal velja formannin og tað ræðist hann.

– Tað eru nettupp fólk haðani ið hava gjørt uppskotið um at skipa Føroyar í fimm valdømi og tí ræðist eg at seta eina nevnd, sum skuldi stýrast av umboðum, sum Fróðskaparsetrið valdi.

### Sigur onki

Sjálvur er hann ein av teimum, sum hevur lagt uppskot fram um at skipa Føroyar í sjey valdømi.

Men hann sigur, at tað er ikki vist, at hann fer at atkvøða fyri sínum egna uppskoti.

– Eg havi ongantíð sagt, at eg fari at atkvøða fyri at gera Føroyar aftur til sjey valdømi.

– Hvussu eg atkvøði, fáa vit at síggja tá ið tað kemur so langt, at atkvøðast skal, sigur Gerhard Lognberg.

Hinvegin sigur hann eisini, at hann sera ivingarsamur um tað er rætt at alt landið skal vera eitt valdømi.

# Fýra uppskot um valdømi

Í gjár viðgjørdi Løgtingið ikki færri enn fýra uppskot um, hvussu nógv valdømi skulu vera í Føroyum.

Eitt av hesum uppskotunum eiga Hergeir Nielsen og Jógvan á Lakjuni úr formansskapinum í Løgtingum.

Teir vilja hava, at Føroyar skulu skipast í fimm valdømi, har Suðuroy og Sandoy eru eitt valdømi og har Vágar og Norðstreymoy eru eitt valdømi.

Annars viðgjørdi Løgtingið eisini eitt uppskot frá Anfinni Kallsberg, Tórbirni Jacobsen, Gerhard Lognberg og Jaspur Vang um at leggja Føroyar sundur aftur í tey sjey gomlu valdømini, sum landið var í, áðrenn alt bleiv eitt valdømi.

Eitt annað uppskot er frá John Johannessen, Annitu á Fríðriksmørk og Poul Michelsen um at seta eina nevnd at viðgera valskipanina og koma við uppskoti um, hvussu hon skal vera.

Og fyri at koma alla kumpassina runt, var eisini eitt fjórða uppskot til viðgerðar. Tað var frá Edmundi Joensen, Magna Laksáfoss og Kára á Rógvi um at skipa fólkatkvøðu um at varðveita Føroyar sum eitt valdømi, ella um landið skal býtast sundur aftur.

Tað var týðiligt, at tað ørkymlaði fleiri politikarar, at so nógv uppskot skuldi koma í einum um at broyta valskipanina.

Og sum tað sæst í eini aðrari grein, vóru summir tinglimir eisini rættiliga illir um, at Løgtingið skuldi "plágast" við slíkum málum í álvarstíðum sum hesum, har nógv átrokandi mál eru at taka støðu til, fyri at fáa búskapin aftur á beint.

Ein grundgeving fyri at skipa Føroyar, sum fleiri valdømi, er, at tað eitt valdømi førir til miðsavning, tí tað verður vónleyst hjá valevnum kring landið at fáa fótin fyri seg.

Ein grundgeving fyri einum valdømi er, at tað er ódemokratiskt ikki at sleppa at atkvøða fyr tí, sum fólk vilja hava á ting. Og ein onnur g rundgeving, sum nógv er gjørt burtur úr, er, at tað styrkir kvinnuliga luttøkuna í politikki.